**SKJAL 1**

til semju millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag dagfest 27. mai 2015

Vísandi til at semjan og broytingar í sáttmálanum millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag hava gildi frá 1. januar 2015 at rokna, eru partarnir samdir um, at reiðaríini eiga í seinasta lagi 1. november 2015 at hava goldið limunum í Føroya Fiskimannafelag munin millum ta løn, ið manningin hevur fingið, og ta løn, sum manningin hevði fingið, um sáttmálabroytingingar vórðu settar í verk frá 1. januar 2015.

Við fyrivarni fyri at reiðarí kunnu hava goldið meira enn tað, sum er ásett í sáttmálanum, kann vegleiðingin niðanfyri nýtast, tá ið eftirreguleringin verður gjørd upp.

1. Viðvíkjandi pkt. 6 (§ 14, stk. 3 í sáttmálanum) fær kokkurin eina regulering, sum er munurin millum nýggju og gomlu ásetingina (kr. 75,00 – 50,00), t.e. kr. 25,00 fyri hvønn mynstraðan dag.

2. Viðvíkjandi pkt. 7 (§ 17, stk. 2.1.) fær hvør maður á línuskipum eina eftirregulering, sum er kr. 10,75 pr. mynstraðan dag, um nýtti dagfrádrátturin hevur verið 350,00 og manningartalið 14. Er nýtti dagfrádrátturin annað tal og/ella manningartalið hægri ella lægri, verður roknað soleiðis: dagfrádráttur x javnbýtisprosent/manningartal = krónutal pr. mynstraðan dag. Krónutal pr. mynstraðan dag x mynstraðar dagar = eftirregulering.

3. Viðvíkjandi pkt. 11 (§ 38 Trolarar á ísfiskaveiðu) svarar hækkingin av javnbýtisprosentinum úr 26,5% upp í 27% til eina lønarhækking á 1,89% um manningartalið er 7 ella hægri. Er manningartalið 6 svarar lønarhækkingin til 1,29%. Manning á partrolarum á ísfiskaveiðu eiga at fáa eina eftirregulering svarandi til henda lønarpartin lagdan afturat higartil goldnari løn fyri tíðarskeiðið 1. januar 2015 og til javnbýtisprosentið er hækkað.

4. Viðvíkjandi pkt. 12 (§39 Lemmatrolarar á ísfiskaveiðu) svarar hækking av javnbýtisprosentinum úr 26% upp í 27% til eina lønarhækking á 3,85% um manningartalið er 10 ella hægri. Viðvíkjandi lemmatrolarum sum partrola .....

5. Eftirreguleringin er løn, har frítíðarløn verður løgd afturat, jf. sáttmálan § ... Somuleiðis eigur eftirreguleringin at verða avgreidd sum vanlig lønarflyting, tó soleiðis at eftirlønargjald bara verður goldið av manningini.